# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Maðurin tey nevndu Orðabókin…

- Eingin í Føroyum fer nakrantíð aftur at verða kallaður »Orðabókin«!

Soleiðis segði Jonhard Mikkelsen, stjóri í forlagnum Sprotanum, tá Jóhan Hendrik Winther Poulsen varð heiðraður á sjeytifimm ára degnum í læraraskúlahøllini leygardagin.

Og rætt hevur hann, tí valla fer nakar einstakur persónur at seta so greið spor eftir seg á málsliga økinum, sum Jóhan Hendrik Winther Poulsen.

Sum fólk og sum tjóð kunnu vit bert fegnast um tey tøk, sum eru tikin málinum at frama. Um vit byrja við Jens Christian Svabo, sum fyri nærum hálvttriðhundrað árum síðani skrivaði »Indberetningarnar«, har hann at kalla skrivaði minningarorð um føroyska málið – og so flyta okkum sløk hundrað ár longur fram, til V. U. Hammershaimb setti síni greiðu fingramerki á skriftmálið – so er tað einki minni enn fantastiskt, at vit sum fólk hava fingið eitt so gott skriftmál, sum vit kunnu nýta til eitt nú tey hálvttriðhundrað eintøkini av okkara blað um árið.

Í fyrstu útgávuni av Sosialinum hin 24. mai í 1927 er høvuðsyvirskriftin »Grønland – Nogle Notitser fra den sidste Tides Debat om grønlandske Forhold…«

Tá var tað púra vanligt, at bløðini skrivaðu á donskum, hóast meginparturin í okkara blað tó varð skrivaður á føroyskum. Men í dag hevði hetta ikki komið fyri.

Í dag hava børn okkara nógvar lærubøkur á føroyskum, hóast ikki er komið á mál. Hetta var als ikki so fyri bert fáum árum síðani. Vit hava føroyskar útvarpsstøðir, og vit hava føroyskt sjónvarp – sum forrestin æt »fjernsýn« til fyri fáum árum síðani.

Treyðugt so – vit eru ikki øll samd um málsligu leiðina. Tað nýtist okkum heldur ikki at vera. Men tað tekur einki av tí megnar arbeiði, sum Orðabókin og onnur við honum gera. Ymiskleikin ger bæði okkum og málið ríkari.

Vit minnast øll aftur á tær frálíku orðabókasendingarnar, sum Jóhan Hendrik Winther Poulsen hevði í útvarpinum árini frá 1969-1993. Tað sigst, at hetta var eitt hugskot, sum hann hevði við sær úr Íslandi, og sum hann borðreiddi við fyri Niels Juel Arge, útvarpsstjóra, sum tók hann upp á orðið.

Hetta vísir, hvussu stóran týdning fjølmiðlar, og í hesum førum útvarp, hava fyri málið. Her hevur maðurin við eyknevninum »Orðabókin« dugað sera væl at gera sær dælt av hesum, til stórt gang fyri mál og mentan okkara. Tað var tí stórt spell, at Kringvarpið ikki vísti frálíka tiltakinum á Læraraskúlanum leygardagin ans, so fólk kring landið fingu lut í hugnaligu løtuni – tí »Orðabókin« er eitt úrslit av mentanarstovninum Útvarpi Føroya.

Her av blaðnum verður ynskt Orðabókini hjartaliga tillukku við degnum.

**Sosialurin**

# Útbúgving í fríum falli

**Summi undrast kanska á, hví vit í 4.p hava valt at stuðla teimum lesandi á Føroya Læraraskúla. Orsøkin er tann, at hetta málið snýr seg um okkara yrki**

Tá vit vóru lesandi á Føroya Læraraskúla, gjørdu vit í fleiri umførum leiðsluna varuga við, at vit ikki fingu teir tímar, vit skuldu hava, og at undirvísingin ikki var nøktandi, ella ov illa skipað. Í staðin fyri at verða tikin í álvara, vórðu vit løgd undir at renna ørindi fyri ávísar lærarar. Hetta er ikki rætt: vit gjørdu vart við okkum, tí at vit vildu hava ta bestu útbúgvingina vit kundu fáa, fyri at vera so dugnalig í okkara faki, sum til ber.

Flest øll, sum hava gingið á Føroya Læraraskúla, ella arbeiða har, vita, at tímatalvan til lærarалesandi verður løgd, áðrenn tímatalvan til námsfrøðislesandi verður løgd. T.v.s. at lærarar, høli, peningur og tímar verða sett av til tey lærarаlesandi fyrst, og síðan fáa námsfrøðislesandi tað, ið er eftir – um tað so strekkir til ella ikki. Harafturat fáa lærararnir, ið undirvísa á skúlanum, meira í løn fyri at undirvísa lærarалesandi.

Sum vit skilja á klagunum frá 2. og 3.p, eru tey, um møguligt, verri fyri enn vit vóru. Tá ið vit byrjaðu á Føroya Læraraskúla høvdu vit eina tímatalvu fyri alt árið, nú standa bara orðini “serlig skrá” á tímatalvuni, men hvat liggur aftanfyri orðini “serlig skrá” fær ongin at vita. Fyri okkum eru orðini “serlig skrá” so tóm, at tað líka væl kundi staði “ongin tímatalva” á tímatalvuni.

Spurningurin er so, hvussu vit kunnu vænta at fáa virðing sum námsfrøðingar, um vit á okkara útbúgvingarstaði eru onnur-sortering?

Spurningar verða settir við, um vit eru skikkað til okkara yrki. Tað eru vit, tí vit hava sjálvi stríðst í trý og eitt hálvt ár fyri at fáa okkara fakliga kunnleika. Fyri ein stóran part, hava vit verið sjálvlesandi á Føroya Læraraskúla.

Tað undrar okkum, at Mentamálaráðið og Fróðskaparsetur Føroya vilja borga fyri, at útbúgvingin til heimsins týdningarmesta starv verður soleiðis viðfarin. Og at hesi heldur ikki hava nakrar viðmerkingar til tað.

*Vegna 4.p*
*Gunnvá Edvardsdóttir*
*Eyð Tórhalsdóttir*
*Marit Mikkelsen*
*Beinta Sørensen*
*Eilin Petersen*
*Eyðbjørt Simonsen*
*Naina Jacobsen*
*Heri Petersen*
*Evi Mikkelsen*
*Katrin Danielsen*
*Sunneva Mohr*
*Merry Kalsø*
*Annfríð Poulsen*
*Bodil Wardum*

# Kommunala fíggjarstøðan eingin hóttan



**HEÐIN MORTENSEN**
formaður, Kommunusamskipan Føroya

So kom enn ein gravarsálmur úr Fíggjarmálaráðnum, hesaferð um fíggjarstøðuna hjá kommununum.

Boðskapurin var ikki til at misskilja. Kommunurnar hava við bindi fyri eyguni í teimum góðu tíðunum rent seg fíggjarliga út av tromuni, og nú má landsstýrið stramma upp.

Jú, víst hava fleiri kommunur torføra fíggjarstøðu í løtuni, men orsøkin til hetta er sanniliga ikki fíggjarligt ella politiskt óskil í kommununum, so sum Fíggjarmálaráðið vil vera við.

Og lat meg siga tað hart og týðiliga, at kommunurnar eru als ikki á veg út av tromuni!

Samlað sæð er kommunuskuldin netto á uml. 450 mió kr. Tó at Fíggjarmálaráðið slær hetta stórt upp, so svarar hetta bert til eina triðings skattaálíkning hjá kommununum. Tað er tí eisini greitt, at kommunuskuldin er ikki nøkur samfelagsbúskaparlig hóttan, tó at hon er ójavnt býtt millum kommunurnar.

Flestu kommunur hava fyri langari tíð síðan endurskoðað fíggjarætlanirnar og tillagað virksemið til fallandi inntøkurnar. Hetta ber boð um skynsama fíggjarstýring og handlikraft.

**Flytur fokus**

Tað er lætt at lesa roknskap, tá ið tað ikki verður farið afturum tølini. Tá Fíggjarmálaráðið velur at skýra politisku leiðslurnar í kommununum fyri manglandi skynsemi, er hetta bert roynd at flyta fokus frá veruligu trupulleikunum.

Og veruligu trupulleikarnir eru, at landið áleggur kommununum nýggjar uppgávur, uttan at neyðuga fíggingin fylgir við. Í øðrum førum verða bert útreiðslurnar fluttar til kommunurnar at gjalda, men uppgávan liggur eftir hjá landinum.

Dømini um hetta eru mong og innan flest øll málsøki, og tað sigur seg sjálvt, at tað er trupult hjá kommununum at fíggjarstýra, tá ið landsstýrið í heilum og uttan fyrilit broytir fortreytirnar.

**Loyniligi kreppupakkin**

Í staðin fyri at leggja eftir kommununum, so kann við røttum spyrjast, hvussu væl landskassin varð stýrdur í góðu tíðunum. Tað mesta av hesum árinum hevur landsstýrið arbeitt við einum loyniligum kreppupakka – einum pakka, sum í stóran mun skal rudda upp eftir landsstýrinum sjálvum.

Tey signal, sum hóast alt eru borðin út, hava mest verið um sparingar og skerjingar. Hetta merkir aloftast, at landskassin enn einaferð arbeiðir við at flyta útreiðslur yvir í kommunukassarnar at fíggja – og tað uttan kompensatión til kommunurnar.

Hetta sigur ikki so lítið um støðið á fíggjarstýringini hjá landsins politisku leiðslu.

Vit mugu ikki gloyma, at kommunurnar standa fyri umleið 30% av almennu útreiðslunum. Kommunurnar røkja fleiri av teimum mest týðandi vælferðartænastunum til borgararnar.

Kommunurnar hava tí ein lyklaleiklut, um ein kreppupakki – ella vakstrarpakki – skal eydnast og verða øllum samfelagnum at gagni.

Men kommunurnar verða tíverri ikki tiknar við í hetta arbeiðið. Tær verða ikki spurdar, tær verða ikki kunnaðar – tær verða stutt sagt hildnar uttanfyri alla ávirkan.

Tí í landsstýrinum verður stýrt við bindi fyri eyguni!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har bláðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.